## Brúka djóraheilivág

Í Danmark eru ungfólk nú farin at brúka djóraheilivág sum rúsevni, skrivar Jydske Vestkysten. Talan er um eitt doyvingarevni, sum djóralæknar brúka til at doyva ross og onnur stór djór. Í Bretlandi hava ungfólk brúkt hetta evnið í fleiri ár, og vit hava bara bíðað eftir, at tað eisini skuldi koma higar, sigur Steen Bach, sum hjálpir misnýtarum í Esbjerg, við blaðið. Løgreglan í Esbjerg váttar, at hon hevur dømi um, at ungfólk brúka hetta evnið.

## Rópa neyðarróp

Fiskimenn og veiðimenn í Niaqornat nærhyendis Uummannaq í Grønlandi sendu í gjár landsstýrinum brævy, har teir kæra sína neyð, tí eingin ísur er við Uumannaq enn. Tað ger, at veiðimenninir sleppa ikki at veiða, sum teir eru vanir, og tí vilja teir sleppa at skjóta hval ístaðin fyri. Í brævinum skriva teir, at nógvur hvalur er at síggja tætt við bygdina. Tí vilja teir hava eina kvotu frá landsstýrinum, so teir kunnu sleppa at veiða hval.

# Fimm ára semja við sjúkrasystrarnar

**Eitt veruligt frambrot á almenna arbeiðsmarknaðinuml sigur Bárður Nielsen, sum fegnast um, at lønarvøksturin yvir eitt longri tíðarskeið verður hildin á einum rímiligum støði**



*Fíggjarmálaráðharrin vónar, at orka nú eisini verður til aðrar lutir enn sáttmálasamráðingar*

SÁTTMÁLI
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Felagið Føroyskir Sjúkraróktarfrøðingar er eitt av feløgunum, sum í longri tíð hevur verið í sáttmálaloysi. Samráðingar hava tó alla tíðina verið við Fíggjarmálaráðið, og hesar hava nú borið eina semju við sær.

Í tíðindaskrivi verður boðað frá, at semjan fevnir um fimm á, har av gott og væl eitt ár eru afturvirkandi, tí gamli sáttmálin var farin úr gildi.

Samlaði vøksturin í lønarkarmurin er hetta tíðarskeiðið 11,6%. Av hesum eru 2,6% tann lønarvøkstur, sum hinir almennu sáttmálarnir hækkaðu við samráðingum seinast, men har til er talan um vøkstur á 3% fyri næstu trý árini.

### Halda kappingarførinum

– Hetta er eitt veruligt nýbrot innan almenna arbeiðsmarknaðin, og eg vóni, at sáttmálar yvir longri áramál í størri mun fara at eyðkenni framtíðina, sigur Bárður Nielsen, fíggjarmálaráðharri.

– Trupulleikin hjá okkum hevur verið, at vit hava nýtt mest sum alla orkutillønarsamráðingar. Semjuarnar seinastu ferðirnar hava annars allar nortið við eitt nú førleikamenning, men veruleikin hevur verið, at vit ongan tíð eru komin hartil, tí vit mest sum uttan slit hava verið í samráðingum við okkurt felag.

Um lønarvøksturin fram til 2010 sigur fíggjarmálaráðharrin, at hann ikki er ónøgdur við hendan.

– Søguliga, so hevur árligi vøksturin eftir kreppuárini verið millum 4 og 4,5% um árið, og tað vita vit, er alt ov nógv. Tann tilvitanin var eisini sjónlig, tá seinastu samráðingarnar góvu 2,6% yvir tvey ár.

Men hækkanin, sum er nú, er tó munandi meira enn 2,6% yvir tvey ár?

– Ja, men sæð í mun til lønargongdina uttanlands, so er hetta á leið støðið. Hjá okkum er sera umráðandi, at talan ikki er um ein lønarvøkstur, sum skeiklar kappingarførið, og tað haldi eg ikki, at hesin ger, sigur Bárður Nielsen.

Umframt sáttmálahækkingar, er ávísar umflokkingar eisini gjørdar, eins og eftirlønin hjá sjúkraróktarfrøðingunum hækkar í 15%. Tær broytingar, sum hetta ber við sær, eru eisini innroknaðar í lønarkarmin.





*Eisini føroyingar vilja anga sum tey kendu, eitt nú sum David Beckham og Jennifer Lopez*

# Føroyingar vilja anga sum David Beckham

**Dagarnir, har ein valdi sær eitt luktilsi fyri lívið, eru farnir. Í dag verður luktilsi skift út nærum líka so ofta sum hosur. Serliga eru tað tey kendu, ið gera luktilsir, sum selja væl; eisini her í Føroyum**

LUKTILSISSØLA
*Eyðhild Jacobsen*
*eydhild@sosialurin.fo*

Paris Hilton, Jennifer Lopez, Sarah Jessica Parker, Naomi Campbell, Victoria og David Beckham. Hetta eru nøvn, ið flest øll av okkum kenna. Í handlum, sum selja luktilsi, eru hesi nøvn ikki bara kend nøvn, men eru eftirhondini eisini vorðin toppseljarar.

– Tey ungu í dag keypa nógv vøru eftir merkjum, og okkara ídnaður er onki øðrvísi í tann máta. Hvørja ferða eitt nú Paris Hilton ella Jennifer Lopez koma út við nýggjum luktilsum, so koma tey ungu inn at keypa, sigur Helga Golightly, sum er leiðari í Heilsu í SMS.

Hóast tað standa kend nøvn á fínu luktilsisfløskunum, so lata tey yngru seg ikki heilt lumpa tó.

– Nei, fyri tí um ein er kendur, so er tað ongin trygd fyri, at hetta fer at selja væl. Eitt nú kom Jennifer Lopez út við einum lukti, ið æt Still, og hendan anga kallaðu tey yngri fyri ólekran, sigur Helga.

### Skifta luktilsi eftir árstíðunum

Tað eru ikki bara tey ungu, ið velja at skifta luktilsi ofta út. Eisini fólk, ið eru komin upp í árini skifta luktilsi minst tvær ferðir um árið.

– Ja, hetta er heilt tíðiligt fyri okkum her í Heilsu. Um summarið, tá ið flestu av okkum kenna okkum lættari í lyndi, so skifta tey til eitt lættari luktilsi, og um veturin gongur tað hinuvegin. Hetta spælur marknaðurin eisini heilt tíðiliga upp á, tí nærum øll, ið framleiða luktilsi, gera tyngri luktilsi um veturin og lættari um summarið, sigur Helga.

Eisini aldurin hevur nógv at siga at siga, tá ið tað kemur til luktilsi.

– Hóast vit øll eru øðrvísi, so er tað rættiliga generelt soleiðis, at tey yngru velja lættari luktilsi og tey eldru velja tyngri luktilsi, sigur Helga.

### Klassikararnir yvirliva

Hóast tað koma nógv nýggj luktilsi út, so eru tað altíð merkir sum yvirliva.

– Her selja vit enn nógv av klassisku Chanel no 5 og Trésor frá Lancome til tær vaksnu kvinnurnar. Og menninir, teir velja eitt nú nógv Jean Paul Gaultier og Hugo Boss, sigur Helga.

Eisini í Drós í miðbýnum í Havn hava tey klassikarar, ið selja nógv. Har siga tey, at Van Gils og Burberry altíð selja væl til menn, og Gucci, Estée Lauder og Dolce & Gabbana selja sera væl til kvinnur.

Men luktilsi eru eisini, ið eru við at doyggja út. Eitt nú tiltikna Old Spice.

– Nei, hetta er slettis ikki at síggja meira her í handlinum. Og eg haldi ikki, at hetta verður saknað. Eg haldi, at tíðirnar eru farnar víðari, og menninir eru bara raskir at fylgja við, sigur Helga.

### Broyttur marknaður

Luktilsismarknaðurin í Føroyum er broyttur rættiliga nógv tey seinastu árini. Tey yngru eru vorðin nógv raskari at keypa.

– Fyri seks árum síðani sóu vit nærum ongi fólk undir 25 ár. Í dag hava tey yngru tikið heilt yvir. Vit síggja ung heilt niður í fjúrtan ára aldur, sigur Helga.

Menninir, ið nærum slettis ikki sóust fyrr, eru í dag eisini vanligir gestur í luktilsishandlum.

– Ja, teir eru bara raskir at vitja okkum í dag. Nú eru teir enntá so ungir sum 12 ár, sigur Helga at enda.